Eysturkommuna

## Námsfrøðingar til dagstovnin í Gøtu

Søkt verður eftir 2 námsfrøðingum at byrja 15. februar 2010. Talan er um eitt starv á 25 tímar um vikuna og eitt starv á 30 tímar um vikuna. Umsóknarfreistin til størvini, er **01. februar 2010 kl. 12.00.**

Søkt eftir 1 námsfrøðingi í tíðaravmarkað starv frá 15. januar 2010 til 15. juli 2010, at menna barn við serligum tørvi. Talan er um starv á 20 tímar um vikuna. Umsóknarfreistin til starvið, er 11. januar 2010 kl. 12.00.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu sendast til Eysturkommunu, Postboks 30, 510 Gøta.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Martu Thomsen, stovnsleiðara á telefon 73 00 51.

## Námsfrøðingur til Brúsa

Søkt verður eftir 1 námsfrøðingi at byrja 01. februar 2010. Talan er um eitt starv á 30 tímar um vikuna.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skulu vera Eysturkommunu, Postboks 30, 510 Gøta, í hendi í seinasta lagi 20. januar 2010 kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sigvør Gregersen, stovnsleiðara á telefon 73 00 41.

## Dagrøktari

Søkt verður eftir 1 dagrøktara í tíðaravmarkað starv, sum verður sett frá 15. januar 2010 til 16. juli 2010. Í dagrøktarskipanini eru børn í aldrinum 0 til 3 ár. Ein dag um vikuna ella meir arbeiða dagrøktararnir saman í spælistovuni sum er knýtt at dagrøktarskipanini, hinar dagarnar eru børnini heima hjá dagrøktarunum.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Arbeiðarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera Eysturkommunu, Postboks 30, 510 Gøta, í hendi í seinasta lagi 11. januar 2010 kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Elin Mikkelsen, stovnsleiðara á telefon 73 00 55.

**Víst verður til heimasíðuna hjá Eysturkommunu: www.eysturkommuna.fo**

Starvslýsing

Børn & Ung: Stuðulsskipanin fyri børn

## Stuðulsfólkaskipanin fyri børn søkir eftir starvsfólkum við heilsufrøðiligari útbúgving

**Í Eysturoy:**
Uppgávan er í løtuni at vera náttarvakt hjá barni við fjølbreki. Setanarbrøkur verður eftir avtalu. Setanartíðin er frá 01.02.2010.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Stuðulsfólkaskipanina fyri børn, Ragnhild Dahl tel 236502, Joan Olsen tel 236501, Karin á Heygum tel. 236508 og Hanna Juul tel 236521.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við prógvum og viðmælum skal sendast til:

Nærverkið, Børn og Ung,
Stuðulsfólkaskipanin fyri børn
Argjaboðagøta 7,
160 Argir

**Umsóknarfreist: 11. januar 2010**

Lesið alla lýsingina á heimasíðu okkara:
www.naerverk.fo / leys størv

Stuðulsfólkaskipanin fyri børn er skipan undir Børn og Ung á Nærverkinum, sum veitur stuðul til heimabúgvandi børn, ið bera brek í aldrinum 0 til 18 ár. Stuðulsfólkaskipanin fevnir um alt landið. Arbeitt verður í toymum og í heimunum. Arbeiðstíðirnar fevna um alt samdøgrið. Dagstovnurin Reiðrið er ein partur av Stuðulsfólkaskipanini fyri børn. Uppgávurnar eru pedagogisk menning, røktaruppgávur, ansing og fylgjara-uppgávur tillagaðar einstaka brúkaranum. Skipanin veitir stuðul til umleið 100 børn og hevur umleið 70 ársverk.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Stuðulsfólk til brúkarar við sálarligum trupuleikum í Vestmanna

Stuðulstænastan søkir við hesum eftir einum stuðli at arbeiða 24 tímar um vikuna.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Elsu Klein Olsen, samskipara á tlf. 764110

**Umsókn**
Send eina umsókn við prógvi, upplýsing um útbúgving og møguligum viðmælum til:

Nærverkið
Stuðulstænastan
Postsmoga 3037
110 Tórshavn
Stílað.: Elsa Klein Olsen

**Umsóknarfreist: 8. januar 2010**

Lesið alla lýsingina á heimasíðu okkara:
www.naerverk.fo / leys størv

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru tríggjar deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan og Stuðulstænastan. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo

Eysturkommuna

## Almennir fundir hjá Eysturkommunu í 2010

Fundirnir eru kl. 19.30 í býráðshúsunum

| | |
|---|---|
| mánadagin | 25. januar |
| mánadagin | 22.februar |
| mánadagin | 22. mars |
| mánadagin | 26.apríl |
| mánadagin | 31. mai |
| mánadagin | 28. juni |
| mánadagin | 30. august |
| mánadagin | 27. september |
| mánadagin | 25. oktober |
| mánadagin | 29. november |
| mánadagin | 13. desember |

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdarráðsfundi, skulu vera kommununi í hendi 14 dagar áðrenn fundin.

## Skeið í teknmáli

**Í januar og februar 2010** verður skipað fyri skeiðum í teknmáli.

Skeiðini verða í hølunum hjá Deyvafelag Føroya, Íslandsvegur 10 b.

Talan er um byrjunarskeið stig 1 og 2, sum hvørt er upp á 20 lektiónir.

Neyvari kunning og tilmelding er hjá skeiðsleiðaranum:

**Edny Poulsen á Tlf. : 518364**

**Fa. EP v/Edny Poulsen**



Lesið Sosialin so eru tit við